# ka demokratiið





*Vladimir Putin í Russlandi. Slobodan Milosevic í Eksjugoslavia. Og Ismael Haniyeh í Palestina. Tríggir stjórnarleiðarar, sum á meistarligan hátt illustrera, hvussu stór misskiljing tað er, at demokratiið hevur sigrað, tá vit hava givið okkara atkvøðu fjórða hvørt ár og annars lata politisku valdsharrarnir stýra, sum teimum lystir. Við meirilutans atkvøðum hava hesir leiðarar avmontera kjarnuvirðir í demokratisku siðvenjuni*

vilji, men demokrati er ikki bara meirilutans vilji. Demokrati er meiri enn tað, sum meirilutin ynskir. Demokratiið gerst ikki demokratiskt, fyrr enn vit skilja hugtøkini "demos" og "kratos", fólka – stýri, sum hetta grikska orðið merkir á føroyskum. Fólkið er nevniliga meiri enn meirilutin. Fólkið er alt fólkið. Fólkið umfatar tí eisini minnilutar. Ja, fólkið umfatar hvønn tann einasta borgara, sum í hesum landi býr. Og um øll skulu bestemma eitt sindur, merkir tað eisini, at eingin sleppur at bestemma alt. Tí snýr demokratiið seg ikki um vald, men um valdsins avmarkingar. Tað snýr seg um mørkini fyri tínum og mínum frælsi.

Tí er demokratiið so nógv meiri enn ein skipan ella konstitutionellur karmur um eitt samfelag. Vit kunnu demokratisera politisku skipanina so galið vit vilja. Men tað nyttar einki, um vit ikki demokratisera menniskjuni í hesum sama samfelagi. Tað demokratiska sinnalagið hjá borgarunum í hesum landinum hevur óendaliga nógv størri týdning enn skipanir, lógir og paragraffir. Tað er við øðrum orðum inni í okkara høvdum, at demokratiið skal realiserast.

Um demos soleiðis merkir alt fólkið, merkir tað eisini, at hvør einstakur skal sleppa at liva í einum demokratii sambært síni egnu sannføring, so leingi viðkomandi annars heldur landsins lógir. Tí noyðast vit at tolerera hvønn annan og viðurkenna fjølbroytni. Og tí noyðast vit at góðtaka, at vit ongantíð kunnu tvinga onnur inn undir somu sannføringar, sum vit sjálvi hava. Við øðrum orðum noyðast vit at góðtaka meginregluna um, at mítt frælsi endar, tá títt frælsi byrjar. Hetta er sjálvur grundtankin handan hugtøk sum toleransa og persónligt frælsi.

Og so kann spurningurin um, hvørji tey demokratisku virðini eru, loksins svarast. Tað er fyrst og fremst rætturin til – undir ábyrgd fyri lógini – at sleppa at velja og liva sítt egna lív uttan statsliga og politiska uppíblanding.

## Fólkastýri á føroyskum

Spurningurin er so til seinast, hvussu politiski veruleikin í Føroyum sampakkar við hesi noblu demokratisku idealini. Og mín niðurstøða er, at demokratiska sinnalagið av og á tykist at hava trong kor í Føroyum. Og at vit mangan síggja antidemokratiskar tendensir, enntá frá fólkavaldum politikarum. Sjónarmið, sum ikki virða tað persónliga frælsið. Sum ikki virða fjølbroytni. Sjónarmið, sum vilja tvinga allar borgarar inn undir eina ávísa sannføring. Sjónarmið, sum gera seg inn á hugmyndina um eitt neutralt statsapparat. Sjónarmið, sum lukta langan veg av andaligari imperialismu.

Og mín kritikkur fer m.a. til teirra, sum seinasta árið hart og týðiliga hava lagt fram eina klárt defineraða visjón um, at í Føroyum er ikki pláss fyri teimum, sum fella uttanfyri tann nationala felagsskapin. Sum onkursvegna fella uttanfyri tað rætta, tað góða, tað reina og tað normala. Hesin háttur at konstruera eitt føroyskt samfelagsgrundarlag hevur ekskluderandi og diskriminerandi undirtónar. Øll sleppa nevniliga ikki upp í part, um okkara samfelagsgrundarlag skal vera nakað, sum "i sagens natur" skilir okkum sundur.

Tak t.d. hugmyndina um eina kristna tjóð. So óføroyskt tað enn kann ljóða, seti eg spurnartekin við hesa vending. Tað er eftir mínum tykki ikki uppgávan hjá einum stati at "bekenna" seg til nakra ávísa religión. Ein statur eigur ikki favorisera nakran ávísan trúarbólk ella átrúnaðarliga institutión. Og at vit framvegis eftir yvirtøkuni av fólkakirkjuni halda fast um hesa leivdina frá einaveldinum í miðøldini, at kirkjan skal vera partur av statinum, er eftir mínum tykki idioti. Og harvið havi eg einki sagt um kristindómin í sær sjálvum og ta positivu ávirkan, sum kristindómurin sum søgulig fortreyt kann hava havt fyri menningina av tí liberala demokratinum.

Stóra andsøgnin er, at tá vit við okkara lógum og skipanum vilja tvinga allar borgarar landsins inn undir eina ávísa religión, kemur trúarfrælsið í vanda. Tí tá vit byggja eitt politiskt projekt á religión, royna vit automatiskt eisini at tvinga onnur inn undir okkara egnu religiøsu sannføringar. Og so hava vit í prinsippinum avtikið trúarfrælsið. Eitt demokrati, sum vil varðveita trúarfrælsið, noyðist tí at vera sekulert, tað vil siga skilja sundur átrúnaðarliga og politiska valdið. Kostnaðurin fyri trúarfrælsið er tí, at vit halda tunguna mitt í munninum og varðveita neutralitetin.

Soleiðis er tað liberala demokratiið og tann vesturlendski nationalstaturin reint prinsipielt bygdur upp. Sum eitt sekulert demokrati við trúarfrælsi, hvørs fremsta endamál er at varðveita tey demokratisku virðini.

> *"Tað er ikki uppgávan hjá einum stati at "bekenna" seg til nakra ávísa religión. Ein statur eigur ikki favorisera nakran ávísan trúarbólk ella átrúnaðarliga institutión*

> *"Tá vit byggja eitt politiskt projekt á religión, royna vit automatiskt eisini at tvinga onnur inn undir okkara egnu religiøsu sannføringar. Og so hava vit í prinsippinum avtikið trúarfrælsið*